Er BP nóg »grønt«

British Petroleum hevur tøknifrøðina at vinna olju úr djúpa Atlantshavi, men spurningurin er nú, um BP kann hava tamarhald á einum oljuleka í slíkum umhvørvi

Birgir Christiansen

ABERDEEN

Aberdeen
18. januar 1995

Tann grøni liturin í búmerkinum hjá BP er ikki tilvildarligur. Eins og Shell roynir BP at reindyrka sítt umhvørvisvinarliga umdømi. Dømi um hetta eru peningagávur til vælgerandi endamál, tremjan av umhugsni fyri umhvørvinum í skúlum, fíggjan av lesandi á hægri lærustovnum og 15 ár eru liðin síðani BP var við til at skapa bestu trygdarviðurskiftu fyri tangaskip í heiminum – hetta var í Sullom Voe í Hetlandi.

Óvart kemur tí á, at BP nú er fyri skotum vegna umhvørvismál. Vísundamenn frá Herriot-Watt University í Edinburgh seta spurnartekin við fyrstu metingarnar hjá BP um dálkingarvandar frá nýggja Foinaven-økinum – fyrsta oljuøkið, ið verður ment í atlantiska útjaðaranum 160 kilometrar vestan fyri Hetland.



23 ár eru liðin síðan olja varð funnin vestarumegin Hetland, men velduga Clair-økið lá ov djúpt, veðrið var ov ringt og oljugoymslurnar lógu ov spjaddar til at nakað kundi vinnast úr teimum við tøknifrøðini, ið var til at taka í sjeytiárunum. Nú hava verkfrøðingarnir hjá BP ognað sær betur kunnleika.

Stórar peningaupphæddir

Væl meiri enn ein milliard krónur eru nýttar í seismiskum kanningum og leitingarvirksemi annars til at finna nýggju oljugoymslurnar Foinaven-økið, ið er í miðalstødd, væntast at vera bert eitt av mongum. Mongdirnar av gassi og olju í atlantiska útjaðaranum eru kanska ikki eins stórar og tær í Norðsjónum, tó er framvegis talan um so mikið, at góð grund er fyri spenninginum á skrivstovuni hjá BP Exploration í Aberdeen.

Tá eitt oljufelag hevur nýtt nógvan pening at finna olju, er bert natúrligt at royna at fáa oljuna upp skjótast gjørligt. Vanliga leita oljufeløgini saman í samstarv at fíggja kostnaðin av at leggja rør til lands. Trupulleikin við Foinaven-økinum er tann, at enn er ikki nóg nógv olja funnin nærhendis, og økið er í sær sjálvum ikki nóg stórt at tað er lønandi at leggja rør til Sullom Voe ella Flotta á Orknoyggjum.

Dýpið á leiðini við Foinaven-økið er uppimóti 500 metrum. Risastórir boripallar, so sum Forties og Cormorant, ið standa á beinum á havbotninum, kunnu ikki nýtast. Tøknifrøðin í oljuídnaðinum er tó so mikið framkomin, at fjarstýrdar skipanir kunnu frá havbotninum pumpa oljuna gjøgnum slangur til vatnskorpuna, har eitt tangaskip tekur ímóti.

Tangaskipini, ið liggja bundin til havbotnin, virka sum goymslur, til eitt annað tangaskip kemur og lastar 60.000 tons av olju upp á tiggju tímar at flyta til lands.

Soleiðis ætlar BP, at menningin av Foinaven skal fara fram, tá byrjað verður av álvara á várið næsta ár. Bretski orkumálaráðharrin Tim Eggar sigur, at tað er í lagi við honum, so leingi sum vinnumálaráðið fær vissu um, at BP er ført fyri at klára møguligar lekkar.

Ivasamt

Kanningin hjá Herriot-Watt setur spurnartekin við, um BP í veruleikanum er ført fyri at seta eina verndarskipan í verk. Fiskimenn, alarar, ferðavinnufólk og djóraverndarfólk í Hetlandi og á Orknoyggjum ræðast alsamt meiri fylgjurnar av einum oljuleka frá Foinaven.

Í 1993 vóru 193 lekar fráboðaðir í Norðsjónum. Orsaka av at oljan er somikið tunn, sást lítið og einki aftur til oljuna á landi. Sjálvt tey 85.000 tonsini av løttu rá-oljuni úr Gullfaks-økinum frá tangaskipinum »Braer« spjaddust á natúrligan hátt upp á nakrar fáar mánaðir.

Aðrar fyritreytir

Oljan úr Foinaven er tjúkri enn olja úr Norðsjónum og bert 10% av oljuni dampa burtur vegna kalda veðrið. Harafturat fara vindur og alda at blanda oljuna saman í ein velling, ið kemisk upployisingarevni bert fáa bilbukt við ein fimtapart av.

Ein verndarskipan skal greitt siga, hvar oljufelagið ætlar sær at goyma reiðskap og kemisk evni at reinsa upp eftir ein leka. BP sigur, at tað mesta verður goymt í Aberdeen og Dundee í Skotlandi og í Southampton í Onglandi. Sjálvt um reiðskapurin varð goymdur í Sullom Voe, so hevði tað tikið eitt døgn, áðrenn reiðskapurin var á staðnum.

Í stuttu summarmánaðunum er møguleiki fyri, at verndarskipanin hjá BP gongur sum hon skal, men tá vetraródnir leika, kann tað gerast sera torført. Seinastu mánaðirnir hava verið ringir til veður á leiðunum kring Hetland og hetta fekk tangaskipið »Mimosa« at kenna í síðstu viku, tá ein brotasjógvur skaddi bógvin nakað. Tílíkir brotasjógvar eru vanligir á leiðini, tí djúphavsstreymar frá Ameriku vera noyddir upp til vatnskorpuna, tá teir koma at landgrunninum. Tá illveður er og tað rekur móti ættini, gerst sera ringt at meta um aldu.

Seinasta sjónvarpslýsingin hjá BP er einki umhildin í Hetlandi. Lýsingin ber boð um, at BP hevur vunnið olju úr størri dýpum enn vestanfyri Hetland og at BP eisini hevur vunnið olju á leiðum, har veðrið er næstan líka ringt. Hetlendingar halda spottandi fyri, at BP ikki hevur megnað bæði í senn.

Skuldi tað ringasta hent, at olja lekur frá Foinaven, so vil vanligasta ættin reka oljuna til Hetlands upp á tveir dagar. Hvørki Orknoyggjar, Norðurskotland, Hebridurnar ella Føroyar eru tryggar heldur. Tá »Exxon Valdez« fór á land í Alaska, gjørdi lekin størsta skaðan meiri enn 500 kilometrar burturi, tríggjar vikur eftir at skipið var farið á land.

Oljuvinnan er givin at navngeva nýggj oljuøkið eftir fugli, so sum Eider, Kittiwake og Tern, ið merkja ávíkavist æða, rita og terna. Minni sannlíkt er at síggja fjøll smurd í olju á sjónvarpsskíggjanum.

Alt hetta merkir, at BP hevur trupulleikar við trúvirði sínum, tí eingin veit hvat henda kann, um ein brotasjógvur ger um seg ella um skip stoyta saman.

14. Matiné'in í Havnar kirkju

Leygardagin 21. jan. kl. 11.30 verður ársins fyrsta tónleikaløta í Havnar kirkju. Tað eru tríggir musikklærarar í Norðoya Musikkskúla, sum hava stovnað Norðoya Blásitrio. Í bólkinum eru Fióna Parker á waldhorni, Daniel Rye á klarinett og Thomas Anderssohn á floytu.

Tey leggja fyri við trimum gomlum, føroyskum løgum, sum Fiona hevur lagt til rættis.

Thomas Morley (1558-1603) var eingilskt tónaskald, organistur í St. Pauls kirkju. Gitin er hann fyri sínar Madrigalir, sum eru verðsligar yrkingar, ofta kærleiksyrkingar. Morleys madrigalir eru enn á døgum høgt í metum og verða sungnar av kórum víða hvar.

Norðoya Blásitrio spælir tríggjar av hesum madrigalum leygardagin.

Telemann (1681-1767) sigst vera tað tónaskaldið, sum skrivaði flest verk – onkur vil vera við, at tey vóru eins nógv sum Bach og Händel skrivaðu tilsamans. Norðoya Blásitrio fer at spæla eina trio, eitt slag av konsert fyri trý instrument.

Matiné-in endar við nýggjari tónum av George Gershwin, sum doyði í 1937. Gershwin hevði framúr góð evni at gera løg, sum øll kundu murra. Tá hann í 1924 bleiv biðin um at gera eitt symfoniskt jazz-verk, var hann ikki seinur og skrivaði tað upp á 10 dagar. Við verkinum, sum fekk navnið »Rhapsody in Blue«, var Gershwin vorðin heimskendur. Burtur úr eini skaldsøgu »Porgy«, sum umrøður lív negaranna í USA, skapti hann operaina »Porgy and Bess«, sum varð frumframførd í 1935. Norðoya Blásitrio spælir 2 av løgunum úr hesi opera.

Tónleikaløtan í Havnar kirkju leygardagin byrjar stundisliga kl. 11.30.